– SEINNU ÁRINI HAVI EG KENT MEG SUM EIN **ELLIGAMLAN UNGLING**, NÚ SLEPPI EG AT ROYNA MEG SUM EIN **BLAÐUNGUR OLDINGI,** SIGUR STEINTÓR RASMUSSEN, SUM Í DAG FYLLIR **50 ÁR**. HANN HEVUR VERIÐ LANDSKENDUR **FRÆNDI** Í 26 ÁR, HEVUR VERIÐ **FØROYAMEISTARARI** Í TALVI, STOVNAÐI **STUDIO PEGASUS**, STÓÐ Á ODDA FYRI **KULUM RÓTUM** OG SKIPAR NÚ FYRI **SUMMARFESTIVALINUM.** TANN GÓÐA LØTAN, RÍK MINNIR OG AT RØKKA SETTUM MÁLUM **SKAPA EYDNUNA**, SIGUR HANN Á FØÐINGARDEGNUM



**SAMRØÐA**

Uni Arge
uniarge@gmail.com

Sum ein hvøss hvirla ein heystarmorgun kom søgan um ein útpíndan brúnan hund í útvarpslurtini, og eftir tann dag var onki, sum tað hevði verið, í føroyskum tónleiki. Árið var 1984, sangskrivarin var Steintór Rasmussen, og nýggja fyribrigdið æt Frændur.

Tey politiskt tilvitaðu hoyrdu beinanvegin, at "Hundurin brúni" var annað enn ein tilvildarlig frásøgn um ein samvitskuleysan bónda og ein plágaðan hund. Her var sosialrealistiskur broddur í. Hjartað var til vinstru, og pennurin fanst at, at summi altíð kradda so nógv inn undir seg, at ov lítið verður til hini.

Síðan fyrstu plátuna hjá Frændum fyri 26 árum síðan hevur Steintór Rasmussen mangan gjørt vart við seg á føroyska mentanarpallinum, og seinnu árini hevur hann serliga lagt sína orku í Summarfestivalin.

Hóast Summarfestivalurin, Steintór sjálvur og Klaksvíkin eru óloysiliga knýtt hvørt at øðrum, vil hann ikki kalla seg lokalpatriot, tí tað er ov primitivt, heldur hann. Men í Klaksvíkini trívist hann sum blomman í egginum, ikki minst á sjálvum føðingardegnum.

**Tú fyllir 50 í dag. Ert tú framvegis ungur og í góðum lag?**

Nei, eg eri ikki so ungur longur, men tað kann heldur ikki vera málið við lívinum. Heldur eigur tað at vera at varðveita hugin at skapa og merkja, at tú livir, um tú so ert ungur ella gamal. Tíbetur bilar lagnum framvegis onki. Seinastu árini havi eg kent meg sum ein elligamlan ungling, nú sleppi eg at royna tíðarskeiðið sum ein blaðungur oldingi. Aldur hevur satt at siga ikki so nógv at siga fyri meg. Ert tú kropsliga og kensluliga hampiliga væl fyri, hevur tú góðar orsøkir at vera nøgdur.

**Hvør er munurin á at vera 50 og 25 ár?**

Tú ert kanska dupult so klókur av mistøkum og góðum lívsroyndum, men hevur ikki helvtina av tí sjálvsáliti, framfýsni og lívsmóti, sum eyðkennir yngru árini. Tað vaksna lívið hevur eisini aðrar dimensiónir, sum tey ungu ikki geva sær heilt far um. Nøkur virði, sum fáa øðrvísi týdning við árunum, eitt nú hvør tín leiklutur er í familjuni, og hvussu tú gert tína ávirkan galdandi í samfelagnum. Kortini haldi eg ikki, at aldursmunurin er ógvusligur ella ræðandi. Tey flestu, sum eru mitt í tjúgunum, eru bæði áhugaverd og vitandi, og á yngri árum ert tú kanska eisini fríari, tá talan er um at skriva, yrkja og smíða løg. Við árunum koma ofta fyrilit og forðingar, og nógvir pennar dovna. Men um tú ikki ræðist tínar egnu meiningar og teir dómarar, sum altíð fara at verða, kann nógv spennandi og vakurt koma frá einum búnum skapandi menniskja.

**Hevur lívið higartil mest verið ein ferð á tindum?**

Skalt tú klúgva upp á nakrar tindar í lívinum, mást tú eisini niður í nakrar dalar og viðhvørt byrja á sløttum. Eg haldi ikki, at hetta at vera hægstur, størstur ella bestur hevur fylt nógv í mínum lívi. Tað er meira sjálv ferðin, sum hevur drivið meg avstað. Tá tú illa veitst, hvagar tú gongur, er uppaftur verri at vita, hvar tú endar. Nøkur av mínum málum havi eg rokkið, men eg vil sanniliga vóna, at nógv er eftir enn.

**Hvør sangur hjá tær sigur mest um tína fatan av lívinum?**

Lívið rúmar so óendaliga nógv, og tað er rættiliga avmarkað, hvat tú kanst siga í einari yrking ella í einum sangi, sum helst ikki skal vera meira enn trý ørindi og eitt hóskandi niðurlag. Kanska er "Lívsmynd," sum eg skrivaði sum 23 ára gamal, mín besta heilsan til lívið. Tað er ikki nakar sosialrealistiskur tungvektari, men sangurin er beint frá hjartanum og hevur eina inniliga vón um frælsi, rættvísi og frið millum menniskju.

**Hevur tú altíð havt tørv á at skriva um kærleika, lívið og samfelag?**

Hatta eru jú trý orð, sum fylla nærum alla tilveruna hjá vanligum hugsandi og elskandi menniskjum, so tað fær ikki verið øðrvísi. Kortini vóni eg, at eg í nøkrum av mínum sangum eri sloppin inn um ta einstaka menniskjað, og at eg havi heintað vanligar gerandismyndir og tíðartinnur á vegnum hesi árini.

**Heimurin er nógv broyttur, síðan tú vart ungur. Er hann betri nú?**

Eg hevði viljað sagt ja, men tað veldst sjálvandi um, hvar tú ert, og hvat tú vilt síggja. Amerika er vorðið betri, Føroyar tað sama, men tað er framvegis svárt at hugsa um støðuna í nógvum londum, har dagurin er kríggj, kaos og kúgan . Okkara vælferð fornoktar seg ikki, og tað er spennandi at uppliva alla tøknina og fyrimunirnar, hon hevur við sær. Eg haldi, at leiðarar, fyritøkur og ríkfólk í hesum partinum av heiminum áttu at gingið undan við størri menningarhjálp og betri handilsmorali. Tann gamla sosialistiska hugsjónin, har fólk í minsta lagi trúðu, at frælsi og eitt virðiligt lív var ein mannarættur, er kámað og eigur ikki so nógvar forsprákarar longur. Hvør er sær sjálvum næstur. Vit krevja nógv og tosa ikki um nógv annað enn okkara lív og okkara vælferð. Vit vilja ikki lata triðja heimin fáa lut í okkara ríkidømi, men tey eru vælkomin at taka ímóti okkara átrúnaði og mentan.

**Verður tú vónbrotin, um summarið verður sólfátækt og regntungt?**

Nei, eg lati meg ikki so lætt ávirka av ringum veðri. Kortini elski eg góðveður bæði í Føroyum og aðrastaðni, men um summarið ikki sleppur at bíta seg fast her á klettunum, og vánirnar fyri veðrinum á Summarfestivalinum eru vánaligar, ja, so lati eg meg ávirka av hesum og verði ivaleyst eisini eitt sindur vónbrotin.

**Kennir tú tað nakrantíð sum, at tú hevur uppbrúkt tína orku?**

Eg havi góðar vinir, sum kenna hetta at vera slaktaðir av stressi og sjúku. Hesa uppliving eri eg spardur fyri, men eg veit, hvussu tað kennist at hava høvdið fult av tonkum og eina kenslu av ikki at røkka til og gera øllum til vildar. Kanska er tað týdningarmiklasta, at kroppurin og høvdið vilja tað sama, so tú kanst vera nærverandi og til staðar í tínum arbeiði og ikki minst í tíni frítíð. Jú, eg royni at hava tamarhald á støðuni, ansi eftir at kopla úr og ikki taka lívið alt ov álvarsliga.

**Hvat ert tú mest errin av at hava avrikað seinastu 25 árini?**

Nú er orðið errin ikki so væl dámt í Føroyum, og vit gloyma rættiliga skjótt bæði viðgongd og mótburð, men í 1990 mundi tað vera Frændur og at gerast føroyameistari í talvi, í 2000 var tað Studio Pegasus og Kular Røtur og í 2010 er tað Summarfestivalurin. Eg havi eisini verið errin, tá míni børn komu í verðina, og tá tað hevur gingið teimum væl.

**Ert tú ein lokalpatriotiskur klaksvíkingur?**

Nei. Eg haldi, at patriotisma er primitiv og førir sjáldan til nakað gott. Kapping millum bygdir og býir er góð í talvi og øðrum ítrótti, men innan mentan og nærum øll onnur øki í samfelagnum er samstarv lyklaorðið. Mær dámar væl at búgva í Klaksvík, og eg kenni meg stak væl í býnum. Kortini er tað meira áhugavert at vera føroyingur.

**Hevði tú trúð, at Summarfestivalurin kundi savna 10.000 fólk á Vágsbøi?**

Enn hava ikki so mong sum 10.000 fólk sungið á Vágsbøi, men næstan, og kanska verður tað í ár. Heilt ærligt, so trúði eg, at Summarfestivalurin kundi gerast nakað stórt og savnandi fyri allar føroyingar, men at undirtøkan skuldi gerast so góð næstan frá byrjan, hevði eg ikki rættiliga ímyndað mær.

**Hvat er tað størsta, sum er hent á Summarfestivalinum higartil?**

At Roger Hodgson eftir at hava verið á flogi í 36 tímar lendi í øllum góðum og sang í lýsingini ein vakran sunnumorgun í august 2006. Tað var okkurt vakurt og andaligt við tí framførsluni, kanska serliga tá hugsað verður um, at helvtin av samsýningini til hesa legenduna úr Supertramp fór óskorin til hjálpararbeiði í triðja heiminum undir heitinum "Give a Little Bit."

**Tú hevur skrivað nógvar tjóðskaparsangir. Hvør er tín dreymur fyri Føroyar í dag?**

At vit megna at taka fulla ábyrgd og ræði á okkara landi, at hesin politiski meirilutin, sum hevur framt eitt slag av stjórnarkvetti og karaktermorði á Tjóðveldi, ikki sleppur at krøkja seg til valdið bara við tí stevnuskrá at halda stórum parti av føroyingum frá ávirkan, og at okkara eftirkomarar gerast føroyskir heimsborgarar.

**Hvat er eitt eydnuríkt lív?**

Tann góða løtan og rík minni. Nøgdsemi í tí dagliga, at sleppa at fylgja dreymunum og røkka settum málum hevur sjálvandi eisini stóran týdning. Stendur valið millum persónliga success og at hava góð viðurskifti við tíni nærmastu, er tað seinna meira virðismikið, men sjálvt tað eydnuríka lívið kann gera ein hugtungan til tíðir. Eg veit ikki, um eg verði eydnuríkari enn tað sama. Meira tú hevur, meira kanst tú missa, og tí er umráðandi, at vit ikki gerast so upptikin og tilvitað av tí eydnuríka og góða lívinum, at vit fara at stúra fyri framtíðini og ræðast óvissuna. Tá er betri at fegnast um ta góðu løtuna og ikki hongja seg í lívsins smálutir. Tað er ótrúliga vakurt at síggja fólk, sum hóast mótburð, sjúku og aldur allatíðina varðveita lívsmótið og liva. Tað er ein vandi við at liva, men tann kjansin mugu vit taka.